

*Gull, silvur og bronsu til Kristian Suna, Sonhard og Hall*

fingu teir tríggir vinnarnir úr Klaksvsík góð úrslit. Kristian Sune endaði við einum meðal uppá 32, Sonhard hevði 25 og Hallur 21. Sonhard hevði besta umfarið í bæði lið- og einstaklingakapping, við ávikavist 224 og 184 eygum. Besta spælið í liðkappingini átti FM meistarin sjálvur, nevniliga góð 900 eygu.

At klaksvíkingar fóru við øllum heiðursmerkjunum undrar ikki. Har finnast evnaríkir spælarar og har er eitt einastandandi gott billardumhvørvi. Tað er ikki eiti á føðingardagsgávu, sum evnaríku og vandu billardspælararnir úr Klaksvíkar Billardfelag lata Klaksvíkini í 100 ára føðingardagsárinum.

Klaksvíkar Billardfelag gjørdist nevniliga eisini føroyameistari fyri lið í ár. Nr. 2 gjørdist Mimir og nr. 3 Fuglafjarðar Billardfelag.



*Ein ótrúliga sikkur Kristian Sune í einum av sigurskendu stoytum sínum*




*Eisini nr. 1, 2 og 3 í liðkappingini fingu steyp handað, tá FM fyri staklingar varð spælt í Klaksvík í vikuskiftinum. Klaksvíkar Billardfelag gjørdist meistari við Kristian Suna og Halli*

# Í dag byrjar stóra fótbóltskappingin í Sosialinum

Fríggjadagin 28. mars kom fótbóltsblaðið hjá Sosialinum á gøtuna.

Frá í dag av og til og við hósdagin 17. apríl verður 1 puntur hvønn dag í Sosialinum. Tilsamans er talan um 15 puntar, sum tilsamans geva eina fullfíggjaða mynd. Enn er ikki avgerð ikki tikin um hvar fótbóltsferðin gongur til, men hetta verður kunngjørt um skjótast gjørligt og kunngjørt í blaðnum.

Fyri at luttaka í í kappingini, ræður um at hava savnað allar puntarnar saman, soleiðis at fullfíggjaða myndin kann setast saman og límast á plátuna, sum er at finna á síðu 31 í fótbóltsblaðnum.

Tá ið hetta er gjørt, skal blaðsíðan, saman við teimum fimtan puntunum, sendast okkum. Minst til, at tá síðan og puntarnir verða send okkum, eitur navnaseðilin niðast á síðuni at vera útfyltur.

Seinasta freist at lata inn til kappingina er hósdagin 1. mai 2008. Vinnarin av fótbóltsferðini verður kunngjørdur í blaðnum í viku 19.







